*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 3 | Veturin 2022 / 2023 | pedagogfelag.fo



**Nú er frítíðarhúsið keypt og tøkt**

**Allir sáttmálarnir uppsagdir**

**Sálarligt arbeiðs-umhvørvi fyllir nógv**

**Trupult at viðgera eym mál í Føroyum**

**Philbrow heldur fram sum aðalskrivari í AIEJI**

**Gott í væntu fyri námsfrøðiliga økið**

*Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt gott 2023*

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
2.200 eintøk

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo



Valborg H. Hammer
Nevndarlimur
valborg@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

4 Nú er frítíðarhúsið keypt og tøkt

5 Allir sáttmálarnir uppsagdir

6 Sálarligt arbeiðs-umhvørvi fyllir nógv

9 Sálarliga arbeiðs-umhvørvið bara versnar

15 Trupult at viðgera eym mál í Føroyum

23 Philbrow heldur fram sum aðalskrivari í AIEJI

25 Valborg úr nevndini og Harald inn

27 Almannaverkið fer aftur til nærleiðslu

28 Pedagogfelagið fegnast um nærleiðslu

30 Fólk vilja hava leiðslu á staðnum

32 Eldhugaðir limir leggja afturat námsfrøðini

35 Gott í væntu fyri námsfrøðiliga økið





ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# Vit minnast vallyftini og gleða okkum



So hevur fólkaræðið virkað. Løgtingsvalið er farið aftur um bak, og nú stendur jólahøgtíðin í durinum.

Áðrenn vit sleppa løgtingsvalinum heilt, er tað hóskandi at minna politisku flokkarnar og øll tey valdu á nøkur av vallyftunum. Ikki minst lyftini um munagóð átøk at basa stóra starvsfólkatrotinum á námsfrøðiligu arbeiðsplássunum.

Starvsfólkatrotið er ein avbjóðing, ið má loysast. Hetta trotið hevur eisini fleiri avleiddar avbjóðingar við sær – starvsfólkini mugu renna skjótari á hvørjum einstøkum arbeiðsplássi, og tað er slítandi upp á so nógvar mátar.

Serliga innan námsfrøðiliga virkisøkið snýr tað seg í stóran mun um at hava stundir at vera saman við børnunum og brúkarunum, og at hava tíð til brúkarar og avvarðandi.

Sosialnámsfrøðiliga uppgávan er í stórum at stuðla undir ein góðan og innihaldsríkan gerandisdag og tað samanhangandi lívið. Tað krevur, at starvsfólkini hava tíð og møguleika at síggja tørvin, tí her er eisini talan um menniskju, ið ikki hava mál, og tískil ikki sjálv kunnu siga frá, hvat teimum tørvar.

Búskaparráðið metti í síni evnisfrágreiðing um vælferðarøkini í 2021, at Almannaverkið kundi vænta at mangla um 700 starvsfólk um 10 ár samanborið við í dag, tá talið av teimum, sum fara frá vegna aldur, er talt við.

Eisini á dagstovnaøkinum hjá kommununum er støðan trupul, tó at starvsfólkatørvurin ikki økist á sama hátt sum í Almannaverkinum. Á dagstovnaøkinum snýr avbjóðingin seg hinvegin um at skapa støðufesti og at manna størvini.

Jú, vit minnast lyftini um styttri arbeiðsviku uttan lønarmiss og serstakt lønarlyft til umsorganarøkini.

Fyri at minka um ítøkiliga trotið á námsfrøðingum hjá landi og kommunum og lyfta fakførleikarnar á øllum námsfrøðiøkinum, er neyðugt at hugsa langt fram í tíðina.

Fyrsta stigið má vera at taka tveir flokkar upp um árið á Fróðskaparsetrinum.

Eisini má arbeiðast við at fáa sonevnda merit-útbúgving á stovn, har royndir verða góðskrivaðar í størri mun enn í dag.

Heilsuskúlin í Suðuroy, har námshjálparaútbúgvingin húsast, má gerast meira atkomuligur – og samstundis eigur útbúgvingin har at verða útbygd, so at til ber at lesa víðari til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum eftir lokna námshjálparaútbúgving.

Í Føroya Pedagogfelag vóna vit, at avbjóðingarnar á námsfrøðiliga virksiøkinum vera settar á politiska breddan sum skjótast.

Eitt annað lyfti, sum bara er vorðið meira aktuelt, nú inflasjónin skarvar alsamt meira burtur av keypiorkuni, er rætturin at trekkja fakfelagslimagjaldið frá í skatti. Tað snýr seg jú um at javnseta arbeistakara og arbeiðsgevara, so vit vænta avgjørt, at hetta lyftið beinanvegin verður framt í verki.

Pedagogblaðið hesa ferð hevur av ymsum orsøkum verið leingi á veg, og tað eydnaðist heldur ikki at fáa tað prentað fyri jól, so í fyrstu syftu mugu tit, kæru limir, taka til takkar við hesi net-útgávu. Beint eftir nýggjár verður blaðið prentað í avmarkaðari útgávu og borið út á stovnarnar.

***Við hesum skal eg vegna meg sjálvan, nevnd og umsiting í Føroya Pedagogfelag ynskja øllum eini góð jól og eitt eydnuberandi nýggjár.***

# NÚ ER FRÍTÍÐARHÚSIÐ KEYPT OG TØKT

Føroya Pedagogfelag hevur nú keypt eina frítíðarsmáttu í Vági til limirnar at leiga, og harvið er limatænastan munandi betrað.

Tað er nevniliga eitt gamalt ynski, sum hevur staðið frammalaga hjá limunum, at felagið útvegaði eitt frítíðarhús til limirnar at leiga fyri ein sámiligan prís.

Á eykaaðalfundi, sum Pedagogfelagið hevði 15. november, var dygg undirtøka fyri at keypa húsið, og longu tvær vikur seinni, 1. desember, yvirtók felagið húsið.

Smáttan er bygd í 2016, er 40 fermetrar stór, hevur rúm fyri seks gistandi gestum, og hevur allar hentleikar. Kostnaðurin fyri at leiga smáttuna verður 500 krónur fyri tað fyrsta samdøgrið og síðan 300 krónur um samdøgrið.

Tað er Húsagrunnurin hjá Føroya Pedagogfelag, sum formliga eigur og umsitur frítíðarhúsið.




*Á eykaaðalfundi, sum var hildin í hølunum hjá Føroya Arbeiðarafelag í Stoffalág í Havn, fekk nevndin í Føroya Pedagogfelag við dyggari undirtøku heimild at keypa frítíðarsmáttuna í Vági. Her greiðir Jógvan Philbrow, felagsformaður, frá, og frammanfyri situr Nikkil Heinesen, næstformaður*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



*Frítíðarsmáttan er 40 fermetrar stór og hevur rúm fyri seks gistandi gestum*

*Mynd: Føroya Pedagogfelag*

# Allir sáttmálarnir uppsagdir

Føroya Pedagogfelag hevur beint undan jólum uppsagt allar sáttmálarnar at fara úr gildi 1. apríl 2023.

Tað snýr seg um sáttmálan fyri námsfrøðingar millum Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin, sáttmálan millum somu partar fyri hjálparfólk og sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið fyri tænastumannasettar námsfrøðingar.

Korona órógvaði sáttmálasamráðingarnar seinast. Sáttmálarnir fóru úr gildi 1. oktober 2020, men tað var ikki fyrr enn 20. juni 2021, at semja bleiv gjørd um nýggjar sáttmálar. Allir blivu gjørdir fyri hálvt triðja ár við gildistíð frá 1. oktober 2020 til 1. apríl 2023.




*Krista Hvannastein, forkvinna í námsfrøðingaráðnum, fegnaðist um væleydnaða evnisdagin í Løkshøll. Myndn er tikin uttan fyri dagstovnin í Gerðinum í Skopun, har hon arbeiðir fyri tíðina, meðan hon er í farloyvi frá Mylnuhúsinum í Klaksvík*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Sálarligt arbeiðsumhvørvi fyllir nógv

**Námsfrøðingarnir høvdu sjálvir sett sálarligt arbeiðsumhvørvi ovast á ynskilistan yvir evni hjá námsfrøðingaráðnum at arbeiða við. Forkvinnan í ráðnum var fegin um góðu undirtøkuna og kveikjandi íkastini hjá fyrilestrarhaldarunum á evnisdegnum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Krista Hvannastein, forkvinna í námsfrøðingaráðnum hjá Pedagogfelagnum, fegnaðist um uppmøtingina á evnisdegnum um sálarligt arbeiðsumhvørvi, sum varð hildin í Løkshøll í Runavík 5. november, og tá dagurin var liðugur, kundi hon frøa seg um ein stak væleyðnaðan dag.

Longu tá hon beyð góðan morgun og vælkomin, tók hon fatur um sjálvt evnið við at vísa á, hvussu týdningarmikil morgunheilsanin er fyri øll

– starvsfólk, foreldur, børn, avvarðarandi og onnur.

– Lagið, tú tekur við tær til arbeiðis, smittar tey, sum tú ert saman við, bæði so og so. Tað kann til tíðir vera ringt at gera, men vit avgera, hvussu vit handla og reagera í møtinum við onnur menniskju. Hvat kunna vit taka til okkum, og sum kann byggja okkum upp, og hvat skulu vit koyra frá okkum, sum kann bróta okkum niður. So eitt gott og hart "góðan morgun" er altíð gott at hoyra, segði Krista Hvannastein.

Síðan hugleiddi hon um, hvussu stóran týdning sínamillum viðurskifti og samskifti hevur fyri huglag og sálarligt umhvørvi, og hon endurgav nógv klók orð um hetta, millum annað tað, sum kendi heimsspekingurin Aristoteles segði um vreiði fyri meira enn 2.300 árum síðan:

"Øll kunnu gerast ill – tað er lætt. Men at verða illur við rætta persónin, í rættan mun, til rætta tíð, av rættari orsøk og á rættan hátt – tað eru ikki øll før fyri, og tað er ikki lætt."

## Felags skylda
Krista Hvannastein minti á, at arbeiðslívið fyllir nógv hjá øllum, og at tað tí er skyldan hjá hvørjum einstøkum at fáa tað besta burtur úr hvørjum degi.

– Evnið "Sálarligt arbeiðsumhvørvi" hevur upptikið meg í nógv ár, bæði sum námsfrøðingur, álitisfólk, og yvirhøvur hvussu vit sum menniskju hava tað saman, hvussu vit arbeiða saman, hvussu vit kunna lyfta hvønn annan upp og í summum førum bróta hvønn annan niður. Og um hvat tað er, sum hendir, tá tað gongur væl, og tá tað gongur minni væl, segði hon.

Hon greiddi frá, at limirnir á aðalfundinum í mars vórðu bidnir at skriva nøkur ynski niður um, hvat teir hildu, at námsfrøðingaráðið skuldi arbeiða við, og tá avtornaði stóð "sálarligt arbeiðsumhvørvi" ovast á ynskilistanum.

Aðalfundurin hjá námsfrøðingaráðnum er sama dag sum aðalfundurin hjá Føroya Pedagogfelag, men tað eydnaðist ikki at manna nevndina á regluliga aðalfundinum, og tí hevði námsfrøðingaráðið eykaaðalfund í mai.

## Ein góð vísindalig greipa
Longu tá var hol sett á við Suna Poulsen, sálarfrøðingi, sum helt ein fyrilestur við heitinum "Hvussu hugsa vit um arbeiðsumhvørvið anno 2022".

Krista Hvannastein greiddi frá, at hon sum álitisfólk eisini hevði havt stóra nyttu av einum skeiði í handfaring av ósemjum, sum Súsanna Olsen, stjórnmálafrøðingur, hevði havt fyri nøkrum árum síðan.

Tí var gjørt av at royna at greipa tey bæði Suna Poulsen og Súsonnu Olsen til evnisdagin í Løkshøll, og tað eydnaðist.

Og tá tiltakið var liðugt, kundi Krista Hvannastein eisini staðfesta, at endamálið við evnisdegnum var rokkið



# SÁLARLIGA ARBEIÐSUMHVØRVIÐ BARA VERSNAR

**Meira tað hevur verið tosað og stríðst um tað sálarliga arbeiðsumhvørvið, verri er tað blivið. Tað helt Suni Poulsen, sálarfrøðingur, á evnisdegi hjá Námsfrøðingaráðnum um sálarligt arbeiðsumhvørvi**

INGOLF S. OLSEN – PRESS
OG BIRITA HAMMER JACOBSEN, UMSITINGARLEIÐARI Í FØROYA PEDAGOGFELAG

Suni Poulsen var fyrstur at hava fyrilestur á evnisdegnum um sálarligt arbeiðsumhvørvi, sum Námsfrøðingaráðið hjá Føroya Pedagogfelag skipaði fyri í Løkshøll 5. nov. Hann er sálarfrøðingur, verkætlanarleiðari á Heilsutrygd og hevur millum annað royndir við at fremja sosialvísindaligar kanningar fyri stovnar og fyritøkur, eitt nú trivnaðarkanningar og leiðslumetingar.

Og hann ballaði onki inn. Tað sálarliga arbeiðsumhvørvið hevur tað onki gott, staðfesti hann – ja, sambært sálarfrøðinginum hevur tað ongantíð verið verri enn tað sama.

– Arbeiðsumhvørvi stóð ovast hjá tykkum, tá tosað varð um, hvat arbeiðast skuldi við á evnisdegnum. Tað verður nógv tosað um trivnað og arbeiðsumhvørvi, og tað hevur tað verið leingi. Tað byrjaði í 1960'unum-1970'unum, og í Danmark fóru tey at gera íløgur í gransking fyri at blíva klókari upp á arbeiðsumhvørvi og fyri at fáa okkurt at vita um strongd og trivnað. Man tað verður verri og verri; meira tað hevur verið stríðst fyri at betra um arbeiðsumhvørvið, verri er tað blivið. Temadagar sum hesin enda positivt, og øll eru upplyft aftaná, men generelt er alt gingið verri síðan í 1960'unum, staðfesti Suni Poulsen.

Og sambært honum er onki, sum bendir á, at støðan er øðrvísi í Føroyum.

– Tvørturímóti benda tey hagtøl, vit hava, á, at avbjóðingin viðvíkjandi strongd í Føroyum líkist støðuni í londunum kring okkum, segði hann.

Arbeiðsmarknaðurin og alt samfelagið broytist støðugt, og serliga nógv er broytt seinastu áratíggjuni. Suni Poulsen helt, at sonevnd broytingarleiðsla og stovnsmenning í tí sambandinum eru undirmett sum leistir at fara ígjøgnum stórar broytingar eftir, tá vit hugsa um arbeiðsumhvørvi og strongd.

Broytingarleiðsla er í stuttum ein leiðsluháttur, ið fær starvsfólkið at hugsa og arbeiða øðrvísi, enn tey eru von við, tá eitt arbeiðspláss skal fremja stórar broytingar.




*Eitt gott arbeiðsumhvørvi er avgerandi fyri trivnað hjá starvsfólkunum, men tað hevur eisini alstóran týdning, at námsfrøðingar og onnur starvsfólk eisini hava eitt lív í javnvág, tá tey ikki eru til arbeiðis – at tey fáa røktað og nøktað sínar grundleggjandi tørvir. Tess nærri miðjuni, starvsfólk merkja av á sirklunum á talvuni, tess betri er javnvágin í gerandisdegnum. – Um bara eitt av økjunum er í órøkt, ávirkar tað alla lívsgóðskuna, segði Suni Poulsen*

*Mynd: Úr framløgu hjá Suna Poulsen, sálarfrøðingi*

## Fjald dagsskrá

Vit eru von við, at arbeiðsplássini javnan koma við ymiskum at lofta slíkum støðum og brúka orku upp á at skapa sær ein samleika í øllum hesum.

Men Suni Poulsen heldur, at tað oftast hevur verið talan um manipulasjón og fjalda dagsskrá, tí veruliga málið hevur verið at fáa starvsfólkið at arbeiða meira, heldur enn at betra arbeiðsumhvørvið og minka strongdina.

Hann tók dømi úr tíðini, tá hann las Í Danmark í 90'unum, og tá hann síðan arbeiddi sum konsulentur har í nullunum.

– Tað bleiv tosað nógv um virði og visjónir, tá fyritøkur og almennir stovnar royndu at skapa sær ein samleika. Í 90'unum og nullunum høvdu arbeiðsplássini temadagar um samstarv, fakligan kvalitet og kjarnuvirði. Fyritøkur brúktu nógvar pengar upp á at skapa entusiasmu ímillum starvsfólkini. Tá eg arbeiddi sum konsulentur í nullunum, galt tað um at lýsa, hvussu fyritøkur vóru lokkandi, og hvussu tær vóru sum brand og sum arbeiðsgevari fyri at fáa tey bestu starvsfólkini at søkja til teirra. Hvat er tað fyri ein fyritøka, vit koma inn í, og hvat vænta vit, varð spurt.

– Mín pástandur er, at tað spakuliga gongur upp fyri okkum, hvussu innanholað hetta er. Tað er manipulerandi, tí arbeiðsgevararnir royna at fáa tykkum at arbeiða meira, segði Suni Poulsen.

Tey yngru ættarliðini hava tó gjøgnumskoðað alt hetta, vísti sálarfrøðingurin á, og tey góðtaka tað ikki, men koma við mótsvarum.

– Tey taka ikki ein arbeiðsgevara í so stórum álvara, tey taka ikki

arbeiðið at sær sum sín samleika, greiddi Suni Poulsen frá.

## Tey ungu eru minni bláoygd

Hann segði, at rákið nú er, at ung eru skjótari at siga upp, um okkurt er. Og hansara egni hugburður til júst hetta er eisini broyttur við árunum.

– Áður hevði eg sagt "tosa um tingini", um ein er stressaður á arbeiðnum, men í dag hevði eg sagt "sig upp". Tí ein skal ikki blíva sjúkur av at fara til arbeiðis, segði Suni Poulsen.

Hann nevndi eisini nýggja rákið, tey kalla "tigandi uppsøgn ella útmelding"– quiet quitting á enskum – har starvsfólkið bara ger akkurát tað, tað skal, og ikki eitt vet meira enn tað.

– Tað er ein reaksjón uppá, at starvsfólk í longri tíð ikki eru væl viðfarin, og tey hugsa, hví skulu vit fremja avrik fyri ein arbeiðsgevara, sum ikki fer væl við okkum? Eg haldi tað vera eina sunna rekasjón – starvsfólk eru ikki so bláoygd nú sum fyrr, segði Suni Poulsen.

## Eitt lív í javnvág

Hann kom eisini inn á týdningin av, hvussu starvsfólk hava tað samanumtikið í gerandisdegnum, um tey hava eitt lív í javnvág og fáa røktað og nøktað sínar grundleggjandi tørvir. Við uppvørpuni vísti hann ein frymil, eina talvu við sirklum at fylla út fyri á tann hátt at vísa, hvussu støðan hjá tí einstaka er á teimum ymisku økjunum, sum hava við lívsgóðskuna at gera (sí mynd).

– Um bara eitt av økjunum er í órøkt, ávirkar tað alla lívsgóðskuna, legði Suni Poulsen dent á.

– Tað hevur týdning, at man sum menniskja livir eitt balanserað lív. Arbeiðsgevarar kunnu píska ein stemning upp – at hetta er tann besti stovnurin – men tað riggar ikki í longdini bara at lena seg afturá so og ikki vilja fyrihalda seg til arbeiðið. Tað skal geva meining at fara til arbeiðis. Tað hevur týdning at taka arbeiðið í álvara, og at tit verða tikin í álvara.

– Eg veit ikki so nógv um tykkara arbeiðspláss, men í Danmark eru almenn arbeiðspláss, og starvs-



*– Áður hevði eg sagt "tosa um tingini", um ein er stressaður á arbeiðnum, men í dag hevði eg sagt "sig upp". Tí ein skal ikki blíva sjúkur av at fara til arbeiðis, segði Suni Poulsen, sálarfrøðingur*

*Mynd: Anja Haldansen*

*– Fyrr var happing buksuvatn ella bank í skúlanum. Í dag er happing nógv meira. Tað er til dømis beinleiðis happing – at eg geri okkurt beinleiðis ímóti tær – ella tað er meira óbeinleiðis happing – at ein fakbólkur á arbeiðsplássinum kanska sleppur á skeið, men ein annar fakbólkur ikki fær bjóðað tað sama, greiddi Suni Pouslen frá*



*Mynd: Anja Haldansen*

fólkini har eru ikki væl viðfarin í longri tíð. Í valdystinum niðri bleiv tað tosað opið um, at heilsusektorurin er knústur og effektiviseraður – tey hava smildrað sektorin sundur, segði hann.

## Hugtøk verða breiðari

Suni Poulsen endaði sína framløgu við at koma við nøkrum ítøkiligum ráðum til námsfrøðingarnar, ið vóru við á evnisdegnum, um, hvussu teir kundu koma við sínum íkastum at bøta um trivnaðin á sínum arbeiðsplássum og kanska eisini broyta seg sjálvar.

– Eitt, sum tað er týdningarmikið at hava við í høvdinum, er, at á nógvum økjum eru fyribrigdi, sum vit fyrr defineraðu smalt, blivin breiðari. Eitt nú strongd, happing og mistrivnaður. Nógvar psykiatriskar diagnosur fevna av tí sama breiðari í dag enn fyrr, og hugtøkini blíva breiðari og meira inklusiv.

– Tað er legitimt at siga, at man heldur okkurt fer ov langt, og tað er lættari at gera tað til ein trupulleika í dag enn fyrr. Tað eru eini ráð til tykkum sum starvsfólk, og tað setur krøv til leiðaran. Og er tað ein einkultur faktorur úti á arbeiðsplássunum, sum ávirkar trivnað, so er tað leiðsla. Leiðsla skal ikki undirmetast, segði Suni Poulsen.

## Happing skal steðgast

Hann gjørdi nógv burtur úr happing, sum er eitt hugtak, ið hevur fingið nógv víðari merking í dag samanborið við fyrr.

– Fyrr var happing buksuvatn ella bank í skúlanum. Í dag er happing nógv meira. Tað er til dømis beinleiðis happing – at eg geri okkurt beinleiðis ímóti tær. Ella tað er meira óbeinleiðis happing – at ein fakbólkur á arbeiðsplássinum kanska sleppur á skeið, men ein annar fakbólkur ikki fær bjóðað tað sama.

– Einstaklingar happa, ella bólkar happa. Likamligur harðskapur, at rulla við eygunum at einum einum starvsfelaga ella flenna eftir honum ímillum fólk, er eisini beinleiðis happing. Og tað er óbeinleiðis happing, um tú ert blíð uttaná ímóti einum starvsfólki, men spakuliga gevur øðrum starvsfólki meira uppmerksemi – tað at gera mannamun upp á onkran útspekuleraðan máta, segði Suni Poulsen og nevndi fleiri onnur dømi.

Men hann legði dent á, at sama hvat slag av happing, talan er um, og um tað er happing ímillum børn ella ímillum vaksin, so snýr tað seg um at steðga henni, og hann fegnaðist um, at fólkaskúlin í dag er farin í hernað ímóti happing.

– Happarin fer ikki at broyta seg. Happarin sjálvur og tann, sum verður happaður, eru í einari ringari støðu, men tey, sum er vitni til tað, tey vita, at um tey onki gera við happingina, so stuðla tey undir hana, segði Suni Poulsen.

## Sálarligur tryggleiki

Sálarligur tryggleiki er tað týdningarmiklasta fyri trivnaðin á einum

arbeiðsplássi, tók hann saman um, og tað er leiðarin, sum hevur ábyrgdina av, at trivnaðurin er góður.

– Ongin tímir at verða óvitandi, ódugnaligur, átrokandi ella negativur. Uppgávan hjá leiðaranum er at geva møguleika fyri, at starvsfólk kunnu seta orð á negativu kenslurnar. Tað er leiðarin, sum skal skapa rúmið, har man kann tosa opið um tingini – eisini í supervisjón. Tað eru dømi um leiðarar, sum burturforklára ymiskt, men leiðarar skulu tosa minni og lurta nógv meiri. Leiðarin skal síggja tykkum, tí onki er meira óbehagiligt enn at vera til arbeiðis og ikki verða sæddur. Men teir flestu leiðararnir gera ikki tað rætta, teir hava "nógv at gera" og vita tí ikki, hvar starvsfólkini eru.

– Míni ráð eru, at tað er gott, um hvørt starvsfólk hevur 15 minuttir nærverandi samrøðu við sín leiðara um vikuna.

## Kjak

Eftir fyrilesturin hjá Suna Poulsen fingu luttakararnir høvi at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Eitt evni her var fjarleiðsla mótvegis nærleiðslu

– Ein fjarðleiðsla er ikki ein leiðari. Tað ljóðar sera akademiskt, tey síggja leiðaran fjórðu hvørju viku til starvsfólkafund, segði Suni Poulsen um fjarðleiðslu.

Ein av áhoyrarunum viðmerkti, at tað á dagstovnaøkinum var gott at hava ein nærverandi leiðara at sparra við.

– Nærverandi leiðarar geva betri trivnað, segði viðmerkjarin.

Ein vísti eisini á, at tað var munur at arbeiða á dagstovni og í fiski. Starvsfólk á dagstovnum vilja verja børnini ímóti ov nógvum starvsfólkaskiftum, og tí kenna starvsfólk seg trýst at vera verðandi á arbeiðsplássinum, hóast tey ikki trívast og helst vildu sagt upp. Tey eru sostatt í einari trýstari støðu, sum so aftur elvir til strongd.

Ein legði afturat, at relasjónsarbeiði elvir til umsorganarmøði.

Hetta fekk Suna Poulsen at ásanna, at "Tigandi uppsøgnin" er torførari at praktisera á dagstovnaøkinum, um fólk ikki trívast vegna vánaligt arbeiðsumhvørvi, enn á nógvum øðrum arbeiðsplássum.

Summi duga betri at seta mørk við árunum, sum henda viðmerkingin ber boð um:

– Tað er stórur munur á nú eftir 16 ár á økinum. Nú seti eg mark fyri, hvat eg vil ganga við til. Millum annað sovorðið, sum at fara á legu. Leiðarin kundi sagt, hvat tað kann geva í peningi.  Vit tóku støðu til, at at nú er nokk – vit vilja ikki vera við til hetta longur. Eg eri nógv broytt uppá 16 ár.

Ein annar námsfrøðingur vísti á, at tað eisini við atliti at børnunum var umráðandi at mótmæla viðhvørt:

– Tað verður kravt meira og meira, men vit fáa ikki tímarnar. Fleiri børn við serligum tørvi verða tikin inn, og tað er ikki í ordan at taka tey inn, um vit ikki hava tímar til tað. Vit mugu geva slíkum gætur sum námsfrøðingar, og siga frá.



## Súsanna Olsen, stjórnmálafrøðingur:

# Trupult at viðgera eym mál í Føroyum

**Vit liva í einum lítlum samfelag, har tað er eyka trupult at taka eym viðurskifti upp. Tí verða onkuntíð konsulentar boðsendir at koma á arbeiðsplássini í staðin fyri at taka einstøk viðurskifti upp við starvsfólk og leiðslu. Tað segði Súsanna Olsen, stjórnmálafrøðingur, millum annað í sínum fyrilestri um sálarligt arbeiðsumhvørvi**

INGOLF S. OLSEN – PRESS OG BIRITA HAMMER JACOBSEN, UMSITINGARLEIÐARI HJÁ FØROYA PEDAGOGFELAG

Súsanna Olsen, stjórnmálafrøðingur og námslektari á Fróðskaparsetrinum, helt annan fyrilesturin á evnisdegnum hjá Námsfrøðingarráðnum um sálarligt arbeiðsumhvørvi í Løkshøll í Runavík.

Áðrenn tað hevði hon við áhuga lurtað eftir fyrilestrinum hjá Suna Poulsen, og hóast hon legði dent á, at hon hevði tann stjórnmálafrøðiliga og leiðslufrøðiliga hattin á høvdinum, so vísti eisini hennara umfatandi tilfar, at tað sálarliga arbeiðsumhvørvið helst ongantíð hevur verið verri enn tað sama.

Súsanna Olsen gjørdi tó vart við, at lítið er til av hagfrøðiligum tilfari um sálarligt arbeiðsumhvørvi í Føroyum, men har er ein nýggj kanning á veg.

Í staðin vísti hon á donsk tøl og eina kanning av sálarligum arbeiðsumhvørvi og strongd, sum danska akademikarafelagið Akademikerne gjørdi í 2018.

### Tað versnar

62 prosent av leiðarunum, sum vóru við í kanningini hjá Akademikerne, sóu eina størri avbjóðing í at handfara trupulleikar við tí sálarliga arbeiðsumhvørvinum enn tí fysiska.

Tað sampakkar væl við tað, sum danska arbeiðseftirlitið, Arbejdstilsynet, sigur í eini allýsing: “Tað sálarliga arbeiðsumhvørvið snýr seg um sálarlig-sosial viðurskifti á arbeiðsplássinum, sum í samspæli við tann einstaka kann ávirka bæði ta sálarligu og ta kropsligu heilsustøðuna – jaliga eins væl og neiliga.”

Og um tað sálarliga arbeiðsumhvørvið á donsku dagstovnunum sigur danska Arbejdstilsynet stutt



*Tilmeldingin til evnisdagin um sálarligt arbeiðsumhvørvi var góð, og dagurin var eisini eitt gylt høvi til prát og hugnaliga samveru*

*Mynd: Krista Hvannastein*

soleiðis: "Stór arbeiðsbyrða og tíðarneyð, stór kenslulig krøv afturat harðskapi og hóttanum eru trý fokusøki, sum Arbejdstilsynet millum annað hevur undir luppinum, tá vit eru á eftirlitsvitjan á serstovnum og dagstovnum."

## Onnur kós enn Heimsmálini

Súsanna Olsen vísti á, at hetta er støðan, samstundis sum tey 17 Heimsmálini hjá ST um burðardygga menning fylla nógv í almenna kjakinum. Gongdin er serliga í andsøgn við Heimsmál nummar 3 , sum hevur yvirskriftina "Góð heilsa og vælvera", og har undirpunktið 3.4 ljóðar soleiðis:

"Fyri 2030 skal deyðatalið, har fólk doyggja tíðliga sum fylgja av ikki smittandi sjúkum, skerjast við einum triðingi við fyribyrging og viðgerð, **og virkað verður fyri sálarheilsu og vælveru** (okkara herðing, blðm.)."

Umframt tann høga menniskjaliga kostnaðin, sum eitt vánaligt sálarligt arbeiðsumhvørvi hevur við sær, so er talan eisini um ein sera høgan kostnað í pengum. Vit vita ikki, hvat tað kostar í Føroyum, men í Danmark verður mett, at vánaligt sálarligt arbeiðsumhvørvið kostar landinum nógvar milliardir krónur um árið.

## Síggja avleiðingarnar

Sjálvt um teir fysisku karmarnir fylla nógv, so fyllir tað sálarliga arbeiðsumhvørvið uppaftur meira á arbeiðsplássunum í dag, greiddi Súsanna Olsen frá.

Hon endurgav Jacob Eli S. Olsen, formann í Føroya Lærarafelag, sum hevur ávarað um gongdina í skúlu-

num við millum annað hesum orðum:

"Vit síggja avleiðingarnar av ótryggum sálarligum arbeiðsumhvørvi, tá limir í Lærarafelagnum leggjast fyri, men vit vita lítið um umstøðurnar annars. Soleiðis er støðan á nógvum arbeiðsplássum í Føroyum, og vit hava fáar og avmarkaðar skipanir at stuðla sálarliga arbeiðsumhvørvið. Sálarliga arbeiðsumhvørvið er ov illa skipað, og tað eiga vit at bøta um. Um lærararin skal gagna børnunum, so má hann hava eitt persónligt yvirskot at geva av hvønn einasta undirvísingartíma, tí hevur arbeiðið fyri sálarliga arbeiðsumhvørvinum í skúlunum so nógv at siga, ikki bara fyri læraran, men eisini fyri næmingarnar."

Súsanna Olsen vísti á, at um hugtøkini Lærarfelagið, lærari og skúli blivu býtt um við ávikavist Pedagogfelagið, námsfrøðingur og dagstovnur, so passar útsøgnin hjá lærarafelagsformanninum akkurát líka væl til dagstovnaøkið.

## Nýggj útbúgving

Súsanna Olsen endurgav eisini danska vinnulívssálarfrøðingin Helen Eriksen, sum síðst í oktober hevði fyrilestur um sálarligt arbeiðsumhvørvi í Norðurlandahúsinum.

Fyrilesturin var partur av ráðstevnuni "Hond í ond", sum Heilsuhjálparafelag Føroya skipaði fyri. Helen Eriksen legði millum annað stóran dent á, at menniskju ikki eru maskinur, men at trivnaður hinvegin hevur stóran týdning í dag, og hetta setur heilt øðrvísi krøv til arbeiðspláss og leiðslu samanborið við fyrr.

Í kjalarvørrinum á broytingini, sum hendir á arbeiðsmarknaðinum, er ein spildurnýggj leiðsluútbúgving fyri almennar leiðarar sett á stovn í Danmark í ár, greiddi Súsanna Olsen frá. Útbúgvingin skal millum annað læra leiðaran at menna eitt felags

*Bólkaarbeiði var eisini á skrá*

*Mynd: Krista Hvannastein*



## Hvat merkir sosialur kapitalur og hvønn týdning hevur hetta fyri sálarliga arbeiðs-umhvørvið?




*Tað kann vera eitt sindur torgreitt at greiða frá, hvat sosialur kapitalur er. Súsanna Olsen brúkti millum annað hesa myndina at lýsa hugtakið*

*Kelda: Framløga hjá Súsonnu Olsen, Løkshøll 5. november 2022*

mál á sínum arbeiðsplássi, sum skal gera tað lættari at tosa um tað sálarliga arbeiðsumhvørvið, og virka við støðið í tí í øllum bygnaðinum. Eisini skal nýggja útbúgvingin geva førleikar at menna og styrkja tað sálarliga arbeiðsumhvørvið og fyribyrgja, at tað kemur í vanda.

### Eyka trupult í Føroyum

Hóast vit hava leiðsluútbúgvingar í Føroyum er ongin, sum setur ljóskastarin so ítøkiliga á sálarliga arbeiðsumhvørvið, men Súsanna Olsen vísti á, at okkara trupulleikar við sálarligum arbeiðsumhvørvi als ikki eru lættari at handfara og loysa, bara tí vit eru eitt so lítið samfelag – tvørturímóti.

– Vit búgva í einum lítlum samfelag, sum ger tað eyka trupult at taka viðurskifti upp. Tí verða konsulentar oftani boðsendir í staðin, heldur enn at einstøk viðurskifti verða tikin upp við starvsfólk og leiðslu, segði hon

Súsanna Olsen segði, at tað telist millum tær stóru avbjóðingarnar á dagstovnaøkinum bæði her heima og uttanlands, at ferðin á arbeiðinum ofta er alt ov stór, tað er trupult at fáa tíð til steðgir, og tað er trupult at útinna arbeiðið soleiðis, at starvsfólkini eisini eru nøgd við dygdina í tí, tey gera.

- Fyri at sálarliga arbeiðsumhvørvið skal vera nøktandi, er tað umráðandi, at alt hetta er í lagi. Men karmarnir at útinna arbeiðið í verða støðugt trengri, og tá enda fólk við at at verða strongd, staðfesti hon.

### Borgarin verðu raktur

Hon reksaði síðan eina rúgvu av átøkum og mannagongdum upp, sum kunnu betra um støðuna á føroysku stovnunum (sí kassar, har fleiri av ráðunum, sum hon vísti við ljósmyndum á evnisdegnum, eru prentað).

Vánaligt sálarligt arbeiðsumhvørvi

rakar í seinasta enda altíð brúkaran, sum so ella so merkir tann vánaliga trivnaðin millum starvsfólkini.

Súsanna Olsen legði dent á týdningin av, at starvsfólk fáa eftirútbúgving, supervisjón og fakliga sparring og refleksjón.

## Grátandi til arbeiðis

Eisini í Føroyum eru rættiligar ræðusøgur um mistrivnað vegna vánaligt sálarligt arbeiðsumhvørvi, visti Súsanna Olsen at siga frá

– Gev starvsfólkum ógreiðar uppgávur, so fært tú trygd fyri misstrivnað. Tað eru dømi um starvsfólk, sum eru so illa fyri, at tá tey nærkast arbeiðinum, fara tey at ristast, og tey gráta, áðrenn tey koma koma inn á arbeiðsplássið, greiddi hon frá.

Ov høgar ambisjónir bæði hjá starvsfólki og leiðslu kunnu eisini elva til eitt sjúkt og skaðandi arbeiðsumhvørvi, og eisini hetta fyribrigdið hava serfrøðingar kannað og skrivað um.

## Tað kann vera nóg gott

Súsanna Olsen umrøddi millum annað bretska barnalæknan og sálargreinaran Donald Winnicott, sála. Hann er eitt nú kendur fyri at hava skapt hugtakið og námsfrøðiligu læruna um "ta nóg góðu mammuna" ella "tað nóg góða foreldrið". Grundhugsanin hjá Donald Winnicott um ta nóg góðu mammuna er, at gaman í er hon ikki fullkomin, men hon er nóg góð til sítt barn.

Súsanna Olsen helt, at soleiðis ber eisini væl til at hugsa um eitt sálarligt arbeiðsumhvørvi.

– Tað nýtist ikki vera fullkomið, men eitt gott og fjálgt stað at vera, og har tú veitst, hvar tú hevur fólk, segði hon.

## Ábyrgdin á gólvinum

Tað er eisini týdningarmikið, at starvsfólk sjálv siga frá og mótmæla, tá vandatekin vísa seg í tí sálarliga arbeiðsumhvørvinum.

Súsanna Olsen nevndi í tí sambandinum Morten Melby, danskur vinnubúskaparfrøðingur og sálarfrøðingur, sum við ráðgevarafyritøkuni Feed-Work, ið hann rekur saman við øðrum, hevur ment eitt konsept at røkka sálarligum tryggleika á arbeiðsplássinum.

Hann hevur í einari fakligari grein í netmiðlinum "Væksthus for ledelse" sett fimm mýtur upp um, hvat sálarligur tryggleiki er – og avsannar tær síðan. Hann staðfestir millum annað, at sálarligur tryggleiki ikki er eitt mál í sjálvum sær, og heldur ikki snýr seg um bara at vera fittur. Morten Melby ger eisini greitt, at tað ikki er leiðslan einsamøll, sum eigur ábyrgdina, um sálarligur tryggleiki ikki er á arbeiðsplássinum, men at tað er eitt sínámillum samspæl ímillum leiðslu og starvsfólk, sum skal tryggja, at sálarliga arbeiðsumhvørvið er í lagi.

## Týðandi sosialur kapitalur

Tann sonevndi sosiali kapitalurin – sum í stuttum lýsir góðskuna á samskifti, sambandi og samstarvi ímillum starvsfólk og leiðslu á einum arbeiðsplássi (sí eisini mynd) – hevur týdning, tá ábyrgd fyri sosialum arbeiðsumhvørvi eisini verður løgd á starvsfólkini.

Tann sosiali kapitalurin kann eisini, eins og allur annar kapitalur, setast

á bók, so hvørt tað rennur inn, og vaksa í virði.

– Tað er altíð týdningarmikið at kunna siga tær góðu søgurnar, men um tað er pláss fyri at tosa um tær, so er eisini lættari at taka truplar støður upp. Um ein hevur tað rúmið og er fyltur upp við sosialum kapitali, so kann ein gott taka eitt sindur út aftur viðhvørt. Tí er tað í lagi ikki at vera ok viðhvørt, um bara tann sosiala kapitalurin er til staðar, segði Súsanna Olsen.

## Neiligar fylgjur av NPM

Gjøgnum tíðirnar eru nógv ástøði ment at royna at finna besta mátan at skrúva eitt arbeiðspláss saman. Eitt ástøði, sum bleiv serliga nógv brúkt sum ítøkiligt leiðsluamboð tey seinastu 20-30 árini av farnu øld, er New Public Management, NPM – nýggj almenn leiðsla á føroyskum.

Ástøðið er umfatandi og torskilt, men snýr seg í stuttum um at effektivisera allar arbeiðsgongdir og øll arbeiðspláss við alla tíðina at máta avrikini hjá tí einstaka í mun til krøv og mál, sum allatíðina verða endurnýggjað.

Hóast tey flestu, ið vóru við til at uppfinna NPM, langt síðan hava viðurkent, at tað eru lýti við NPM, so er hesin leiðsluhátturin ikki lagdur í grøvina allastaðni enn.

Men Súsanna Olsen var ikki í iva, tá hon útnevndi júst NPM sum ein syndara, tá hugsað verður um støðuna á nógvum almennum arbeiðsplássum í dag.

– Ein orsøk til vánaliga arbeiðsumhvørvið er New Public Management við sínum áhaldandi dokumentasjónskrøvum. Vælferðarstaturin kostaði ov nógv, so tí skuldi okkurt nýtt roynast í almenna geiranum. Tey, sum hálovaðu NPM hava tó seinni biðið um umbering. Onki er galið við at dokumentera, og tað skal eisini til, men um ov nógv verður gjørt av, kann tað ávirka trivnaðin á arbeiðsplássinum, segði Súsanna Olsen.

– Tað nýggja er so New Public Governance, har tað verðu bakkað aftur, so starvsfólk kunnu fáa arbeiðsgleðina aftur – og fáa frælsi í sítt arbeiði og ávirkan á tað, segði hon.

## Bólkaarbeiði og kjak

Súsanna Olsen setti eisini námsfrøðingarnar á evnisdegnum í sving við bólkaarbeiði, har nógv av øllum tí teoretiska um gott ella ringt sálarligt arbeiðsumhvørvi, sum hon hevði hugleitt um, skuldi roynast av.

Hon endaði eisini við at geva luttakarunum høvi at seta spurningar og koma við viðmerkingum.

Ein viðmerking var um at melda seg sjúkan, tá starvsfólk hava trupulleikar við sálarliga umhvørvinum á arbeiðinum. Tá kann henda, at onkur møtir teimum í býnum, ella á øðrum almennum støðum, og tað kann so elva til misnøgd á arbeiðsplássinum, tí tey sum eru har hava havt meira at gera orsakað av sjúkrameldingini.

Súsanna Olsen viðurkendi, at hugsanin helst ofta er, at um eitt starvsfólk kann fara á kafé seinnapart, so hevði tað eisini kunnað møtt til arbeiðis fyrrapart. Hetta kann so elva til misnøgd, sleyg og slatur og seta tann, sum hevði sjúkrameldað seg, í eina keðiliga støðu.

## Fyri at sálarliga arbeiðsumhvørvi skal verða nøktandi er umráðandi at hetta er ílagið...

- Tillaga arbeiðsbyrðuna og tænastustøði, soleiðis at tit fáa so nógva dygd inn í arbeiði sum gjørligt, og at hetta sampakkar við tey starvsfólkini, sum eru tøk.
- Tillaga lutfall ímillum arbeiðsmongdina og tænastustøði, tá ið broytingar henda og tilkalla evt. vikarar.
- Raðfest arbeiðsuppgávurnar, sleppi tykkum undan ógreiðum og mótsigandi krøvum, umframt long tíðarskeið har tit arbeiða undir trýsti.
- Verið samd um námsfrøðilig mál.
- Syrg fyri ráðlegging og samskipan, so at starvsfólki hevur ein reellan møguleika at útinna sínar arbeiðsuppgávur í rættari raðfylgju, umframt at arbeiðsbyrðan verður javnt býtt millum starvsfólkini.
- Miðla greitt og týðuligt til viðskiftafólk uttanfyri stovnin hvat fyri tænastustøði dagstovnurin kann bjóða.

## Soleiðis kann ein arbeiða fyribyrgjandi og fáa eitt gott sálarligt arbeiðsumhvørvi

- Syrg fyri einari felags fakligari tilgond til málbólkin og hvussu tit loysa kjarnuuppgávuna
- Tit sum eru leiðarar, útinnið týðuligan stuðul til starvsfólki
- Innheinta passandi kunning og vitan um børn og ung frá relevantum samstarvspørtum
- Syrg fyri at starvsfólki hava passandi vitan og førleikar viðvíkjandi børnum og ungum, ið hava serligan tørv.
- Gev starvsfólkinum møguleika fyri supervisjón og fakligari sparring
- Gev starvsfólkinum møguleika fyri at steðga á og tíð, til fakliga reflektión.

## Hvat eyðkennir sálarliga arbeiðsumhvørvi?

**Góða**

- Tryggleiki
- Gott hugalag
- Greið arbeiðsuppgáva
- Ein gleðir seg at fara til arbeiðis
- Kenslan av at gera mun
- Lítil og eingin frávera
- Fólk støðast
- Høgur socialur kapitalur
- Góða feed back mentan

**Minni góða**

- Stórur ótryggleiki
- Óunniligt hugalag
- Útihýsan, klikur og baktala
- Kaotisk og ógreiðar arbeiðsuppgávur
- Høg sjúkufrávera
- Gjøgnumtrekkur
- Lágur socialur kapitalur

*Súsanna Olsen kom ógvuliga víða um í sínum fyrilestri og kom eisini við ítøkiligum ráðum, sum vórðu varpað upp við ljósmyndum*

*Kelda: Framløga hjá Súsonnu Olsen, Løkshøll 5. november 2022*



## Ein tignarlig avbjóðing

Aftur her vísti hon á stóra týdningin, sum tað hevur, um tann sosiali kapitalurin á einum arbeiðsplássi er stórur, og at leiðslan dugir at fasilitera, sum í stuttum merkir at gera tað so arbeiðsligt sum gjørligt hjá starvsfólkinum – at skapa røttu umstøðurnar fyri samskifti og samstarvi.

– Tann mest tignarliga avbjóðingin hjá leiðarum í dag er fasilitering. Um ein leiðari sleppur tí, so verður galið. Smáar søgur, kunnu vaksa seg til stórar søgur. Tað er týdningarmikið, at starvsfólk vita, hvussu ein ger, um ein gerst sjúkur. Ein leiðari hevur ábyrgd fyri at greiða frá slíkum mannagongdum við jøvnum millumbilum, segði hon.

Sjálvt um sálarliga arbeiðsumhvørvið á einum arbeiðsplássi er so mikið gott, at tað saktans rúmar, at starvsfólk gera vart við viðurskifti, ið kortini ikki eru í lagi, so ásannaði Súsanna Olsen, at tað ikki altíð er so lætt at vera tann fyrsti, ið ger tað – "the first mover", sum tey siga á enskum.

– Tað er torført at verða "first mover", men tað er sera týdningarmikið, at tey siga frá, legði hon tó dent á.




*Góða samstarvið ímillum Benny Andersen, forseta í AIEJI, og Jógvan Philbrow, aðalskrivara, hevur ment seg til eitt gott vinarlag. Í Lausanne í Sveis blivu báðir afturvaldir í sessirnar*

*Mynd: AIEJI*

# PHILBROW HELDUR FRAM SUM AÐALSKRIVARI Í AIEJI

**Jógvan Philbrow ætlaði upprunaliga ikki at stilla upp aftur sum aðalskrivari í AIEJI, men eyka umhugsunartíðin vegna koronu og tileggjan frá øðrum fekk hann at broyta meining**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Á aðalfundinum hjá AIEJI, altjóða felagsskapinum fyri sosialnámsfrøðingar, sum var í Lausanne í Sveis 6. – 9. september, bleiv Jógvan Phil-

Benny Andersen bleiv sjálvur eisini afturvaldur á aðalfundinum í Lausanne.



brow, formaður í Føroya Pedagogfelag, afturvaldur sum aðalskrivari næstu fýra árini.

At tað yvirhøvur kom upp á tal, kann felagsskapurin tó í fyrsta lagi takka koronu fyri.

Tí av røttum skuldi aðalfundurin nevniliga verið hildin í fjør, og tá hevði Jógvan Philbrow gjørt av ikki at stilla upp aftur til aðalskrivarasessin.

Farsóttin gjørdi tó, at aðalfundurin í fjør var útsettur til í ár, og eyka umhugsunartíðin fekk Jógvan Philbrow til at broyta avgerð – væl eggjaður av danska forsetanum í AIEJI, Benny Andersen, ið eisini er formaður fyri Socialpædagogerne, fakfelagið hjá teimum 40.000 donsku sosialnámsfrøðingunum.

Benny Andersen bleiv sjálvur eisini afturvaldur á aðalfundinum í Lausanne.

Hini í nevndini eru: Guillaume Favre, Sveis, kassameistari, Emmanuel Grupper, Ísrael, Marit Selfors Isaksen, Noreg, Ney Moraes Filho, Brasilia, og Claudio Desanti Sanchez, Uruguei.

## Spennandi og avbjóðandi

Jógvan Philbrow vissar um, at tað ikki var vantandi hugur, ið gjørdi, at hann upprunaliga ikki ætlaði at stilla upp aftur sum aðalskrivari.

– Starvið sum aðalskrivari í AIEJI er bæði avbjóðandi og spennandi, og mær dámar tað væl, men Føroya Pedagogfelag er eitt lítið felag við einari lítlari umsiting, so tað er ikki nógv orka til annað arbeiði enn tað, sum beinleiðis hevur við felagið at gera. Tí ivaðist eg í, um eg kundi liva upp til væntaninar, sum AIEJI hevur av einum aðalskrivara. Men síðan havi eg fingið vissu fyri, at tað ikki verður hildið at vera nakar trupulleiki. At eg bleiv afturvaldur, man so eisini vera prógv fyri, at tey hava álit á mær, sigur Jógvan Philbrow.

Aðalfundirnir hjá AIEJI eru fjórða hvørt ár og hvørja ferð er ein stór ráðstevna knýtt at teimum. Av tí, at tiltakið hesa ferð av røttum skuldu havt verið í fjør, verður næsti aðalfundur við ráðstevnu longu um trý ár – á heysti í 2025. Tá stendur Jógvan Philbrow sostatt aftur fyri vali sum aðalskrivari.

Tað er longu greitt, at Danmark verður vertur fyri AIEJI-aðalfundinum og -ráðstevnuni í 2015, men enn er ikki endaliga gjørt av, júst hvar í Danmark tað verður.

# Valborg úr nevndini og Harald inn

**Valborg Heradóttir Hammer hevur tikið seg úr nevndini í Føroya Pedagogfelag, tí hon fær ikki nevndararbeiðið at sampakka við lívið sum smábarnamamma og nærum fulltíðararbeiði. Harald Joensen tekur sæti í nevndini í hennara stað**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Valborg Heradóttir Hammer, sum var toppskorari á nevndarvalinum á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag í mars, hevur nú boðað felagnum frá, at hon tekur seg úr nevndini.

Í eini heilsan til limirnar skrivar hon soleiðis:

"Góðu limir

Eg fari við hesum at kunna tykkum um, at eg havi valt at trekkja meg sum nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag.

Tá eg stillaði upp, var eg ordiliga spent uppá uppgávuna og vildi gera mun.

Sannleikin er tann, at mítt høvd og viljin vilja meira, enn hvat orkan og tíðin strekkir til við einum smábarni og nærum fulltíðarstarvi. Eg meti,



*Valborg Heradóttir Hammer hevur tikið seg úr nevndini vegna ov stóra arbeiðsbyrðu afturat tí at vera mamma at smábarni og røkja eitt arbeiði sum námsfrøðingur í nærum fulla tíð*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Harald Joensen takkaði fyri eina góða tíð í nevndini, tá tað miseydnaðist at endurvinna sessin á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag í mars. Hann tapti í lutakasti og bleiv varafólk, men nú fær hann aftur sæti í nevndini*

*Mynd: Bárður Lydersen*

at tað er tann rætta avgerðin, soleiðis at onnur kunnu traðka til og arbeiða í nevndini vegna tykkum limir. Eg fari at takka fyri tíðina, eg havi verið, og ein serlig tøkk fer til tykkum 374, sum valdu meg inn í mars 2022.

Tó verði eg sjálvandi framvegis limur í felagnum, og síggjast vit til ymisku tiltøkini og aðalfundirnar frameftir.

Takk fyri meg.

Vinalig heilsan

Valborg Heradóttir Hammer"

## Harald tekur sæti

Á aðalfundinum í mars bleiv Harald Joensen varafólk eftir eitt spennandi nevndarval, har tað stóð á jøvnum ímillum hann og Gunnvá Akraberg Hansen.

Lutakast skuldi til, og tað vann Gunnvá Akraberg Hansen. Tey bæði býttu sostatt um pláss, tí frammanundan hevði hann havt sæti í nevndini, meðan hon var varafólk.

Men nú Valborg Heradóttir Hammer hevur tikið seg úr nevndini, tekur Harald Joensen  aftur sæti í nevndini.

# ALMANNAVERKIÐ FER AFTUR TIL NÆRLEIÐSLU

**Í umskipaða Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum tódnar leiðlsan úr trimum niður í ein depilsstjóra, úr 13 niður í seks eindarleiðarar, og aftur fyri verða tað 36 vanligir leiðarar í staðin fyri 29 frammanundan**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Á nýggjárinum fer nýggi bygnaðurin í Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum at virka.

Bygnaðarbroytingarnar eru umfatandi, og hyggja vit at verandi leiðslubygnað sum eini pyramidu í trimum løgum, so merkja broytingarnar, at nógv orka verður flutt frá teimum ovastu løgunum og niður í tað niðasta.

Trivnaðardepilin er í dag skipaður við trimum depilsstjórum, 13 eindarleiðarum og 29 leiðarum. Í nýggja bygnaðinum er bara ein depilsstjóri, seks eindarleiðarar og 36 leiðarar.

Bygnaðarbroytingarnar verða formliga settar í verk 1. januar, men tað er meira enn eitt ár síðan, at fyrireikingarnar av álvara byrjaðu, og sjálv tilgongdin varð skotin í gongd 20. september, tá bygnaðarbroytingin bleiv almannakunngjørd, og lýst varð innanhýsis eftir teimum seks nýggju eindarleiðarunum.

## Nøvn eru sett á

Samstundis var boðað frá, at Asta Marjunardóttir, sum frammanundan var stjóri á deplinum fyri likamligt brek, er nýggjur stjóri fyri allan Trivnaðardepilin. Hermann Mortensen og Ingun Mohr Jacobsen, sum eisini vóru depilsstjórar, eru farin í ávikavist annað starv uttan fyri stovnin og nýtt starv á Fakdeildini í Almannaverkinum.

Síðan eru teir seks nýggju eindarleiðararnir eisini settir. Í gamla bygnaðinum hava tær 13 eindirnar bara havt hvør sítt nummar, men í nýggja bygnaðinum er talan um seks nanvgivnar eindir: Virknistænastan, Likamligt brek, Barnavernd AV, Menningartarn, Autisma og Sosialpsykiatri.

Jóhanna Jancyardóttir verður eindarleiðari í Virknistænastuni, Elin Danielsen í eindini Likamligt brek, Julianna Næs Olsen í eindini Barnavernd AV, Teitur Jóannesarson í eindini Menningartarn, Elisabetj Christiansen í eindini Autisma, og Andrea Petursdóttir verður eindarleiðari í eindini Sosilapsykiatri.

# Pedagogfelagið fegnast um nærleiðslu

**Formaðurin í Pedgogfelagnum hevði ynskt, at felgið varð tikið við í tilgongdina og í minsta lagi varð betri kunnað, men hann leggur tó dent á, at nærleiðsla altíð er betri enn fjarleiðlsa og heilsar tí bygnaðarbroytingini í Trivnaðar-deplinum hjá Almannaverkinum og skiftinum til nærleiðslu vælkomin**



*Í Føroya Pedagogfelag fegnast tey um nærleiðsluna í Almannaverkinum, men fýlast á, at felagið ikki var tikið við tíðliga í gongdini ella í hvussu er ikki var væl kunnað. Eindarleiðarar eru uppsagdir, men bygnaðarbroytingarnar hava tó ikki elvt til nakað rættiliga starvsfólkamál – enn í hvussu er. Á myndini eru tað Jógvan Philbrow, felagsformaður, og Birita Hammer Jacobsen, umsitingarleiðari í Føroya Pedagogfelag*

Mynd: Ingolf S. Olsen

INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Fjarleiðsla er ikki nøkur verulig leiðlsa, tí ein leiðsla má virka á staðnum, vita hvat gongur fyri seg og vera tøk hjá starvsfólki, brúkarum og avvarandi. Tí fegnast vit sjálvsagt um, at Almannaverkið nú sjálvt hevur ásannað, at tað var skeivt, tá skipanin við fjarleiðslu varð sett í verk á sinni.

Tað sigur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, í sambandi við nýskipanina í Almannaverkinum, har Trivnaðardepilin fær nýggjan bygnað á nýggjárinum.

Fjarleiðslan í Almannaverkinum kom í sambandi við samanleggingina av táverandi Nærverkinum og Almannastovuni til Almannaverkið í 2011.

Gongdin aftaná var heldur trilvandi. Talið av eindarleiðarum og leiðarum hevur sveiggjað við tað, at tað hava verið heilt upp í 20 eindir, og innihaldsliga hava tær verið skipaðar út frá ymiskum fortreytum.

## Afturvendandi kritikkur

Í hvussu er hevur misnøgd valdað um bygnaðin síðan 2011, og tað er serliga fjarleiðslan, sum hevur staðið fyri skotum.

– Tað hevur verið ein afturvendandi kritikkur hjá okkara limum, at teir hava saknað eina nærverandi leiðslu. Tað hevur millum annað verið torført at fáa framt neyðugar broytingar úti á bústovnum og har, brúkararnir av tænastunum hjá Almannaverkinum annars eru, tí ongin leiðsla hevur verið á staðnum, sum við egnum eygum hevur sæð og fatað trupulleikarnar. Hetta vænti eg avgjørt fer at verða nógv betri nú, tí nú fer at bera til at hava eitt gott fakligt samskifti við eina nærverandi leiðslu um øll viðurskifti, sigur Jógvan Philbrow.

– Tað eigur eisini at borga fyri betri starvsfólkatrivnað, tá tað er stutt ímillum starvsfólkini á gólvinum og leiðsluna – so stutt, at tey kunnu hyggja hvønn annan í eyguni hvønn dag. Og fyri at búfólk og brúkarar skulu hava tað gott, er tað ein fortreyt, at starvsfólkini hava tað gott og trívast, leggur hann afturat.

## Kom púra óvart á

Tó at Føroya Pedagogfelag fegnast um nýggja bygnaðin og nærleiðsluna, sum nú aftur verður sett í verk, so finst formaðurin at, at Almannaverkið ikki hevur tikið felagið við í allari tilgongdini.

Felagið frætti ikki um bygnaðarbroytingarnar fyrr enn dagin eftir, at sókt var eftir nýggjum eindarleiðarum í sambandi við broytingarnar, og tí komu tær púra óvart á.

– Tað haldi eg ikki vera nøktandi, tí sjálvt um innihaldið er gott, og vit fakliga kunnu gleðast um broytingarnar, so snýr hetta seg eisini um starvsfólk, sum verða rakt – um menniskju. Talið av eindarleiðarum verður jú minkað við meira enn einari helvt, og fleiri teirra eru limir hjá okkum. Vit hava skyldu at tryggja, at alt gongur rætt fyri seg, og at uppsagdir leiðarar fáa boðið annað starv í tann mun, tað yvirhøvur ber til. Vit gera sjálvandi okkara skyldu, men tað hevði tó tænt teimum betri, um tey høvdu kunnað ráðført seg við okkum tíðliga í gongdini. Og tað hevði avgjørt verið ein fyrimunur fyri umsitingina í felagnum, um hon var kunnað um, at nakrir av okkara limum fóru at blíva uppsagdir ella skuldu í annað starv við øðrum starvstreytum.

– Tá bygnaðarbroytingar eisini hava broytingar í starvsviðurskiftum við sær, er tað góður siður, at sáttmálaparturin verður tikin við í prosessina beinanvegin, sigur Jógvan Philbrow.

Ikki øll tey uppsøgdu í sambandi við bygnaðarbroytingarnar hava tikið av tilboði um annað starv, men kortini hava bygnaðarbroytingarnar ikki elvt til nakað rættiligt starvsfólkamál hjá Føroya Pedagogfelag – enn í hvussu er.

# Nýggjur eindarleiðari:

# FÓLK VILJA HAVA LEIÐSLU Á STAÐNUM

**Jóhanna Jancyardóttir verður eindarleiðari í nýggju Virknis-tænastuni undir Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum. Hon heldur, at nærleiðslan er góð fyri bæði starvsfólk og brúkarar, og at hon letur upp fyri meira fakligheit í arbeiðinum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Námsfrøðiligu starvsfólkini undir Trivnaðardeplinum hjá Almanna-verkinum eru sum heild sera væl nøgd við, at nærleiðsla aftur verður reglan á bústovnum, verkstøðum, frítíðarskúlum og øðrum tilboðum, sum Almannaverkið varðar av.

Ein teirra er Jóhanna Jancyardóttir, sum býr í Húsavík, og seinastu nógvu árini hevur verið leiðari á Virknis- og umlátingardeplinum á Sandi. Ta seinastu tíðinia hevur hon eisini verið leiðari á tveimum deildum á Eirargarði í Havn.

Á nýggjárinum klývur hon eitt stig uppeftir á almenna starvsstiganum, tá hon tekur við sum eindarleiðari í nýggju Virknistænastuni undir Trivnaðardeplinum hjá Almanna-verkinum. Men tó at hon sjálvur nú fær meira yvirskipaðar leiðsluupp-gávur, fegnast hon serliga nógv um tættari sambandið, sum fram eftir verður ímillum starvsfólk og leiðslu hjá Almannaverkinum, nú allur leiðslubygnaðurin verður broyttur.

– Tað hevur víst seg, at ongin unnast væl við fjarleiðslu. Fólk vilja hava leiðslu á staðnum, og tað er í veru-leikanum eisini leiðslan, sum kann



*– Fólk vilja hava leiðslu á staðnum, og tað er í veruleikanum eisini leiðslan, sum kann og eigur at tryggja kvalitetin í gerandisdegnum. Tí hon er har allatíðina, men fólkið gongur í vaktum, sigur Jóhanna Jancyardóttir, eindarleiðari í nýggju Virknistænastuni undir Trivnaðardeplinum hjá Almannaverkinum*

*Mynd: Privatmynd*

og eigur at tryggja kvalitetin í geran-disdegnum. Tí hon er har allatíðina, men fólkið gongur í vaktum.

– Bygningarbroytingarnar við teimum seks nýggju eindunum merkja eisini, at virksemi, sum líkist, verður savnað í viðkomandi eind. Tað haldi eg vera ordiliga gott, tí tað gevur betrir rúm fyri, at

starvsfólk og leiðsla kunnu fara í dýpdina í fakinum og harvið eisini gera fakið betri, sigur Jóhanna Jancyardóttir.

## Lættari at síggja tørvir

Hon heldur eisini, at nýggja meira logiska uppbýtið av tænastum, býtt á seks eindir, saman við fleiri leiðarum á staðnum fer at gera tað lættari at fáa eyga á tørvir og møguliga at ávísa – visitera – víðari í skipanini.

Virknistænastan, har hon verður eindarleiðari, umfatar vard verkstøð, frítíðarklubbar, frítíðarskúlar og umlætting.

– Ein stórur partur av brúkarunum er heimabúgvandi, og tað er ofta í onkrum av hesum tilboðunum, at tey hava sítt fyrsta møti við Almannaverkið. Men fyrr vóru hesi tilboðini spjadd á ymiskar eindir, so tað var ikki lætt at hava eitt samlað yvirlit. At tað er savnað, og at leiðsla er á staðnum, eigur at gera tænastuna betri og eisini gera tað lættari at ávísa víðari, sigur Jóhanna Jancyardóttir.



# ELDHUGAÐIR LIMIR LEGGJA AFTURAT NÁMSFRØÐINI

**Fakligi áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum hevur havt fleiri tiltøk, síðan bólkurin var stovnaður fyri skjótt hálvum fjórða ári síðan, og øll tiltøkini eru onkursvegna skjalfest við greinum og myndum, so tey eisini kunnu verða til nyttu fyri eftirtíðina**



## ÁHUGABÓLKURIN DAGSTOVNANÁMSFRØÐI Í FØROYUM

Á eykaaðalfundi hjá Føroya Pedagogfelag í mai 2019, legði formaðurin fram møguleikan fyri at stovna fakligar áhugabólkar. Limir í Føroya Pedagogfelag kunnu eftir § 14 taka seg saman í fakligar áhugabólkar.

Ikki gekk long tíð, áðrenn fyrsti áhugabólkurin sá dagsins ljós. Eldhugaðir námsfrøðingar, leiðarar og hjálparfólk á dagstovnaøkinum møtast nú regluliga og kunnu nørdast við tí, tey brenna fyri, gerandisnámsfrøði á dagstovnum í Føroyum.

Leisturin, áhugabólkurin ynskir at arbeiða eftir, er at fáa gerandisnámsfrøðina lýsta, bæði til íblástur og refleksjión. Og nevndin í áhugabólkinum setti sær longu á fyrsta fundinum fyri, at blaðfólk skuldi vera við til øll tiltøkini, soleiðis at skrivligt tilfar skuldi spyrjast burtur úr.

Vit vita tað væl, hava ofta havt tað á orði, at á Føroyskum dagstovnum hendir nógv áhugavert. Starvsfólk á ymisku stovnunum seta námsfrøðilig tiltøk og verkætlanir í verk, sum hóska til tann einstaka stovnin. Hesar verkætlanir og hesi tiltøk eru tað, sum drívur verkið og ger arbeiðið áhugavert.

Ein andsøgn kann vera í at møtast og nørdast um gerandisnámsfrøði, tá nógv starvsfólk ikki náa alt tað, tey ynskja, og til tíðir eru um at hokna undir starvsfólkatroti og vantandi játtan. Men námsfrøðin er ov týdningarmikil til at detta niðurfyri. Tí leggja vit stúranir og møði til viks eina løtu og møtast til tiltøk ymsastaðni í Føroyum.

Meira vit hoyra, meira vilja vit vita

Fyrstu greinarnar eru nú at finna á Facebook, í Pedagogblaðnum og á bókasøvnum.

Síðan áhugabólkurin varð stovnaður, hevur áhugabólkurin søkt um peningaligan stuðul frá felagnum, og limagjaldið er 100 krónur um árið. Peningurin verður brúktur til greinaskriving, hølisleiðu og rættlestur og annað.

### Leiðreglur

Ávísar ásetingar skulu verða fylgdar, fyri at ein áhugabólkur kann góðkennast av nevndini. Ein bólkur skal skipast innan fakligu áhugamálini á námsfrøðiliga virksiøkinum. Viðtøkur við endamálsorðing skulu gerast fyri bólkin. Limalisti skal førast fyri bólkin, og minst 20 limir í Føroya Pedagogfelag skulu tekna seg sum limir. Limagjald skal ásetast og er eitt minstamark uppá 50 krónur um hálvárið ella 100 krónur um árið.



"EVERYONE WANTS TO BE APPRECIATED, SO IF YOU APPRECIATE SOMEONE, DON'T KEEP IT A SECRET."

– MARY KAY ASH



Tó kann krevjast meira.

Fakligur áhugabólkur skal skipa seg við forfólki, skrivara og kassameistara, sum hava raksturin av áhugabólkinum um hendi. Á hvørjum ári áðrenn aðalfundin hjá Føroya Pedagogfelag skal felagið fáa boð um, hvør mannar nevndina í fakliga áhugabólkinum. Endamálsorðing og limalisti skal eisini leggjast við við váttan um goldið limagjald (til dømis kontoavrit, har tað greitt framgongur, at limir hava goldið inn). Hetta verður brúkt til at meta um, um bólkurin er virkin og eigur lut í árligu játtanini frá felagnum.

Stutt frágreiðing um, hvat er gjørt farna árið og framtíðarætlanir, kunnu eisini leggjast við, tó er hetta ikki ein treyt. Ikki er neyðugt, at bólkurin hittist "fysiskt". Til ber til dømis at halda netfundir, Skype, Facebook ella líknandi.

§14. Fakligir áhugabólkar

Stk. 1. Við góðkenning frá nevnd felagsins kunnu stovnast fakligir áhugabólkar við limum, sum hava sama fakligan áhugað. Bólkarnir kunnu fáa fíggjarligan stuðul frá felagnum.

Stk. 2. Uppgávur áhugabólkanna eru:
– at virka fyri felagsligum samanhaldi millum limir áhugabólkanna og at stuðla hvør annan soleiðis
– at limirnir gerast alsamt meiri tilvitaðir, m.a. við at halda fundir og skeið
– at eggja til kanningar og stuðla kanningum arbeiðsøkinum viðvíkjandi
– at vera við at menna námsfrøðina

Stk. 3. Limir kunnu sjálvboðin og við at gjalda serstakt limagjald stovnseta og vera limir í einum ella fleiri fakligum áhugabókum.

Stk. 4. Fakligu áhugabólkarnir verða skipaðir eftir leiðreglum, ið nevnd felagsins hevur gjørt.

Stk. 5. Nevnd felagsins skal góðkenna reglugerðina hjá einum Fakligum áhugabólki.

## Dagstovnanámsfrøði í Føroyum

Fakligi áhugabólkurin er undir Føroya Pedagogfelag. Hetta merkir, at allir limir í Føroya Pedagogfelag, eisini hvílandi limir, kunnu gerast limir í áhugabólkinum. Tiltøk, sum vit skipa fyri, eru bert fyri limir í áhugabólkinum. Tilmelding hjá nýggjum limum fer fram við at melda seg til á dagstovnanamsfrodi@gmail.com. Limagjaldi er 100 krónur um árið.

Í nevndini sita Edda Hjartvarsdóttir forkvinna, Elin N. W. Tausen skrivari og Jóna Guttesen kassameistari, Ingilín Berg og Ingigerð Andreassen nevndarlimir.

Endamálið við bólkinum er at birta uppundir samrøður/kjak um dagstovnanámsfrøði í Føroyum. Ynskið er at kveikja áhuga og saman blíva klókari og menna vitanina um dagstovnanámsfrøðina í Føroyum. Bæði hjá okkum, sum starvast á økinum, og í samfelagnum sum heild. Dentur verður lagur á, áhaldandi at orða og miðla okkara dagstovnanámsfrøði.

***Hvat við at stovna fleiri áhugabólkar?***

# GOTT Í VÆNTU FYRI NÁMSFRØÐILIGA ØKIÐ

**Samgongan hevur fingið fleiri av lyftunum til okkum við í samgonguskjalið. Námsfrøðiliga økið og umsorganarøkið hava ongantíð fyrr átt so stóran lut í einum samgonguskjali**

JÓGVAN PHILBROW
FORMAÐUR Í FØROYA PEDAGOGFEALG

Vit í Føroya Pedagogfelag hava við spenningi bíðað eftir samgonguskjalinum, og nú, tá spillfeska skjalið er vorðið almannakunngjørt, mugu vit bara staðfesta, at tað inniheldur nógv gott fyri tað námsfrøðiliga økið.

Vit síggja fram til, at arbeiðsvikan nú verður stytt, men her halda vit tó, at ferðin er alt ov lítil. Tað tekur ov langa tíð at koma niður á 37 tímar, tá bara ein tími verður skorðin av annað hvørt ár. Tað átti ikki at verið nøkur forðing fyri, at arbeiðsvikan bleiv stytt í einum.

Eisini síggja vit við spenningi fram ímóti, at lønirnar á umsorganarøkinum verða lyftar, tí tað lovar samgonguskjalið eisini.

Samgongan boðar eisini frá, at tey ynskja at dagføra barnaverndarlógina og dagstovnalógina – tvær lógir, hvørs karmar fleiri av okkara limum arbeiða innanfyri. Vit halda eisini, at dagføringarnar eru tiltrongdar, og vit síggja fram til at vera tikin við í hetta arbeiði.

Vit fegnast eisini um, at nýggja landsstýrið heldur fram við ætlanunum at útbúgva fleiri námsfrøðingar og samstundis fer undir at skipa merit-útbúgvingar, sum aftur eigur at geva fleiri av okkara limum møguleikan at útbúgva seg.

At vit fáa eitt brekumboð er eisini kærkomið, soleiðis at borgarin verður stuðlaður í at fáa eina so góða tænastu sum gjørligt.

Sum heild mugu vit staðfesta, at námsfrøðiliga økið og alt umsorganarøkið ongantíð fyrr hava átt so stóran lut í einum samgonguskjali sum hesa ferð.

Eftir er so at vóna, at tað fer at verða arbeitt miðvíst og hart við at fremja ætlanirnar í samgonguskjalinum, og ikki minni, at tað ber boð um, at hetta týdningarmikla øki, sum námsfrøðiliga økið er, fer at fylla meira og fáa hægri politiska raðfesting í framtíðini.

At enda skal eg vegna Føroya Pedagogfelag nýta høvið at ynskja øllum tingfólkum til lukku við valinum og teimum nýggju landsstýrisfólkunum til lukku við teirra sessum.




Umboðsráðsval 2022

# Vilt tú umboða kundarnar í LÍV?

**Set tín dám á og stilla upp til Umboðsráðið hjá Ognarfelagnum LÍV**

Nú kanst tú mynda framtíðina hjá Føroya størsta lívstryggingar- og eftirlønarfelag. Sum kundi í LÍV stendur tær í boði at gerast valevni til Umboðsráðið.

**Ásetingar í sambandi við uppstilling:**

- Tú ert kundi í LÍV
- Hevur 5 stillarar
- Ert ikki í starvi ella í nevnd/umboðsráði hjá fyritøku, sum kappast við LÍV.

**Freistin at stilla upp er til og við 15. desember 2022.**

Sí meira á liv.fo/val

set X við LÍV